# Endurminning

**Endurminning**
Ein endurminning er frásøgn um tað, vit minnast afturá úr okkara egna lívi.



Jóannes B. Lamhauge er føddur 25. desember 1985. Jóannes er fjølbroyttur listamaður. Hann er listamálari, rithøvundur, grafiskur sniðgevi, sjónleikari, filmsleikstjóri, sangari og sangskrivari, men er best kendur sum listamálari og sangari.

Her hevur Jóannes B. Lamhauge skrivað eina **endurminning** frá sínum barndómi. Hann hevur sjálvur myndprýtt.



# At tekna er at ganda

Tá ið eg gekk í skúla, fann eg ein gandastav í **pennahúsanum**. Men eins og eg ikki dugdi at súkkla fyrstu ferð, eg royndi tað, dugdi eg heldur ikki at brúka hendan gandastavin beinanvegin. Hann fór ofta **krutlandi** og dansandi eftir pappírinum hjá mær, uttan at nakað skil var á.

Men eg var treiskur og trúgvur sum trøllið, og ein dagin fekk eg umsíðir **bilbugt við** gandastavinum. Knappliga stóðu alskyns undarligar verur og gløddu at mær upp úr pappírinum. Tað tóktist sum um, at eg hevði gandað tær fram burtur úr púrasta ongum. Og nú stóðu tær bara her og bíðaðu eftir, at eg teknaði fleiri.

"Ikki sita og tekna í tímanum!" plagdi lærarin at siga við meg, men lítið visti hann um, hvat eg nú dugdi. Á pappírinum kundi eg heilt og aldeilis sjálvur ráða, hvat hendi. – Um rossini skuldu hava veingir, um dinosaurarnir skuldu hava túsund **tøkutenn** ella bara eina, ella um trøllini skuldu hava 40 halar ella bara eina stóra trøllarumpu. Alt bar til!

pennahúsi krutla fáa bilbugt við tøkutonn

Eg sá knappliga eitt hav av hugskotum. – Eitt víðopið hav, har eg var sjórænari og sjálvur kundi ráða, hvønn veg **kumpassin** peikaði.

Einki var ov óveruligt ella ov fjarskotið. Um mítt hugflog kundi røkka tí, jamen so kundi eg eisini ganda tað niður á páppírið á borðinum.



**kumpass**



Nú eru nógv ár, síðan eg fann gandastavin í pennahúsanum, men eg brúki hann enn. Næstan hvønn tann einasta dag. Munurin er bara tann, at nú sigur ongin lærari við meg, at eg ikki skal sita og tekna.

– Nú ringja tey til mín og biðja meg tekna.

Men nú skal eg siga tær nakað. Eg havi hoyrt, at í summum pennahúsum liggja gandastavar enn og bíða eftir, at onkur fer at finna teir. Tað ræður bert um at vera tolin við teimum.

– Kanska liggur ein í tínum pennahúsa. Hvør veit ...



**1. Sjórænari á einum havi av hugskotum**
Nú hevur tú lisið eina endurminning.

Hetta er ein endurminning, har Jóannes B. Lamhauge sigur frá, hvussu hann byrjaði at tekna. Tað er týðiligt, at honum dámar at tekna. Hann ber blýantin saman við ein gandastav, sum megnar at fáa øll hugskot til veruleika. Í fyrstani var tað torført at brúka gandastavin, men tá ið hann fekk bilbugt við honum, sá hann eitt hav av hugskotum, og hann føldi seg sum ein sjórænara, sum sjálvur ráddi yvir, hvønn veg kumpassin peikaði.



- Tosið um, hvat tað merkir at vera sjórænari á einum havi av hugskotum.
- Tekna eina mynd til setningin.
- Tosið um, hvat tað merkir at vera trúgvur sum trøllið.



2. **Alt ber til**

Í endurminningini vísir Jóannes á, at alt ber til, tá ið tú teknar. Tað er tú, sum gert av, um rossini skulu hava veingir, um dinosaurarnir skulu hava 100 tøkutenn ella eina, og um trøllini skulu hava 40 halar ella bara eina stóra trøllarumpu.

- Tekna tína mynd. Tú gert av, hvat er á myndini.
- Vís einum makkara myndina og greið frá henni.
- Býtið um leiklut.



Næstu ferð tú fert á skúlabókasavnið, kanst tú vita, um tú finnur onkra bók, sum Jóannes B. Lamhauge hevur myndprýtt.